## Viðmerking:

# Hin stóri munurin



Hví er tað so trupult at finna eina semju, tá allir flokkar á Løgtingi eru samdir um, at vit skulu hava eina nýggja samstarvsavtalu millum Føroyar og Danmark?

Svarið er eittans. Samgongan hevur valt eina óbrúkiliga og óvirðiliga mannagongd, sum hon ikki vil víkja frá. Andstøðan vísir hinvegin á eina heilt aðra leið, sum ein stórur meiriluti av føroya fólki tekur undir við.

Men hvar er so tann stóri munurin ímillum mannagongdina hjá samgonguni og ta betru leiðina, sum andstøðan vísir á?

**Tvey dømi**

Vit kunnu lýsa munin við tveimum myndadømum (her nevnd sum dømi "E" og dømi "B" — Tjóðveldisleiðin og Samstarvsleiðin):

*E)* Ein raskur skipari hevur ætlanir um at keypa sær eitt gott og nýtt skip, sum kann geva arbeiði til nógv fólk, bæði á sjógvi og landi, men hann hevur ikki einsamallur nóg mikið av peningi. Hann fer tí inn til sín góða granna, sum eigur fitt av pengum, og biður um hansara hjálp. Jú grannin vil fegin hjálpa, men, sum vera man, ikki heilt treytaleyst. Hann vil hava ávirkan á skiparaksturin alt eftir hvussu nógvan pening hann setir í skipakeypið.

Skiparin skilir ikki hugsunarháttin hjá grannanum, og heldur fyri, at fólk sum hava ráð, skulu stuðla, tá talan er um góð hugskot. Men grannin skilir ikki hví hann bert skal gjalda uttan at valda.

Samanber hetta við samgongunar hugsan.

Skiparin ilskast inn á grannan, men vil kortini ikki gevast á hondum. Hann vil gera fleiri royndir, fyri at yvirtala grannan. Strilti gongur, skiparin gerst ótolin og fer nú undir at nýta onnur amboð, fyri at kroysta grannan.

Grannalagið gerst alt meira kaldligt. Øll sum skiparin tosar við fáa at vita, at grannin er ómøguligur, tí hann vil ikki loysa fíggjarliga trupulleikan hjá skiparanum uppá hansara máta.

Samanber hetta við hugsunarháttin hjá Høgna Hoydal.

Endin á hesi søgu er, at einki skip verður keypt, og grannalagið verður ongantíð gott aftur.

*B)* Ein annar raskur skipari ætlar eisini at keypa eitt gott og nýtt skip, men hesin hevur heldur ikki einsamallur nóg mikið av peningi. Eisini hesin skiparin hevur ein góðan granna, sum eigur fitt av peningi. Hann vitjar grannan og greiðir honum frá síni ætlan. Teir gerast skjótt samdir um keypið, og seta á stovn eitt partafelag har grannin eigur 70% og skiparin 30%. Teir gera eisini ein sínamillum sáttmála um, at skiparin keypir partabrøvini frá grannanum so hvørt sum raksturin gevur avkast.

Eftir eina skiftistíð uppá 15 ár hevur skiparin í sátt og semju keypt øll partabrøvini, og báðir partar eru sera væl nøgdir við gjørdu avtaluna, og grannalagið hevur ongantíð verið so gott sum nú.

Her er talan um ein skilamann, ið dugur at nýta teir møguleikar, sum eitt felagsríki kann geva.

Her verður hugsað um eitt felagsríki, har hvør partur sær hevur fult sjálvstýri, men har nøkur heilt fá øki, við stórum fyrimuni, verða lyft í felag. — Samanber við skipanina í USA.

*Tórshavn tann 31.08.2000*
**Trygvi F. Guttesen**

## BBC WORLD

**Fríggjadagur 1. september**
0.00 **BBC News**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **BBC News**
1.30 **Talking Movies**
2.00 **BBC News**
2.30 **The Sky At Night**
3.00 **BBC News**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **BBC News**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **BBC News**
5.30 **Click Online**
6.00 **BBC News**
6.30 **Science World**
7.00 **BBC News**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **BBC News**
8.30 **The Air Show**
9.00 **BBC News**
9.30 **Science World**
10.00 **BBC News**
10.30 **HARDtalk**
11.00 **BBC News**
11.30 **Talking Movies**
12.00 **BBC News**
12.30 **Science World**
13.00 **BBC News**
13.30 **HARDtalk**
14.00 **BBC News**
14.15 **World Business Report**
14.30 **Talking Movies**
15.00 **BBC News**
15.30 **Science World**
16.00 **BBC News**
16.30 **Asia Today**
17.00 **BBC News**
17.15 **World Business Report**
17.30 **The Air Show**
18.00 **BBC News**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **BBC News**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **BBC News**
20.30 **Life**
21.00 **BBC News**
21.30 **World Business Report**
22.00 **BBC News**
22.30 **Correspondent**
23.00 **BBC News**
23.30 **World Business Report**

**Leygardagur 2. september**
0.00 **BBC News**
1.00 **BBC News**
1.30 **Click Online**
2.00 **BBC News**
2.30 **Science World**
3.00 **BBC News**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **BBC News**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **BBC News**
5.30 **Talking Movies**
6.00 **BBC News**
6.30 **Simpson's World**
7.00 **BBC News**
7.30 **Click Online**
8.00 **BBC News**
8.30 **Correspondent**
9.00 **BBC News**
9.10 **Horizon: »An insight into PVS«**
10.00 **BBC News**
10.10 **Tobacco Wars**
11.00 **BBC News**
11.30 **Holiday**
12.00 **BBC News**

## BBC PRIME

**Fríggjadagur 1. september**
0.00 **TLZ: »People's Century – 1959, Endangered Planet«**
1.00 **TLZ: »Horizon – A Perfect Oil Spill«**
2.00 **TLZ: »Somewhere a Wall Came Down«**
2.30 **TLZ: »Shaping Up«**
3.00 **TLZ: »Projecting Visions«**
3.30 **TLZ: »What You Never Knew about Sex – Reptile Reproduction«**
4.00 **TLZ: »Deutsch Plus«**
4.15 **TLZ: »Deutsch Plus«**
4.30 **TLZ: »Landmarks – Time Lines«**
4.50 **TLZ: »Back to the Floor – Drop in Rank«**
5.30 **TLZ: »English Zone«**
6.00 **Noddy in Toyland: »Jack Frost Is Coming to Town«**
6.30 **Jackanory: »Coming to England«**
6.40 **William's Wish Wellingtons: »William and the Alien«**
6.45 **Playdays: »The Playground Stop«**
7.05 **Run the Risk**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge**
8.20 **Change That**
8.45 **Vets in Practice: »On Call«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Legendary Trails: »Return to the Sacred Ice«**
11.00 **TLZ: »English Zone«**
11.30 **Can't Cook, Won't Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change That**
13.00 **Style Challenge**
13.30 **EastEnders**
14.00 **The Naked Chef: »Girlfriend«**
14.30 **Can't Cook, Won't Cook**
15.00 **Noddy in Toyland: »Jack Frost Is Coming to Town«**
15.30 **Jackanory: »Coming to England«**
15.40 **William's Wish Wellingtons: »William and the Alien«**
15.45 **Playdays: »The Playground Stop«**
16.05 **Run the Risk**
16.30 **Top of the Pops Special**
17.00 **Vets in Practice: »Love and Marriage«**
17.30 **Celebrity Holiday Memories**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Holiday Heaven**
19.00 **2point4 Children: »The Lady Vanishes«**
19.30 **Red Dwarf IV: »Justice«**
20.00 **Between the Lines: »Blooded«**
21.00 **Harry Enfield and Chums**
21.30 **Later with Jools Holland Compilation**
22.20 **The Fast Show**
22.50 **Dr Who: »Logopolis«**

**Leygardagur 2. september**
0.30 **TLZ: »Vibrations«**
1.00 **TLZ: »New York – Making Connections«**
1.30 **TLZ: »Open Advice - Study to Succeed«**
2.00 **TLZ: »Two Religions: Two Communities«**
2.30 **TLZ: »Fortress Europe«**
3.00 **TLZ: »Mining for Science«**
3.30 **TLZ: »Cyberwar«**
4.00 **TLZ: »English, English Everywhere«**
4.30 **TLZ: »Children and New Technology«**
5.00 **TLZ: »Art in Australia«**
6.00 **Noddy in Toyland: »Telling the Whole Truth«**
6.30 **William's Wish Wellingtons: »William to the Rescue«**
6.35 **Playdays: »The Dot Stop«**
6.55 **The Wild House**
7.20 **Noddy in Toyland: »Sing Yourself to Sleep«**
7.50 **Playdays: »The Tent Stop«**
8.10 **Insides Out**
8.35 **Incredible Games**
9.00 **Ice Fox**
9.50 **Battersea Dogs' Home**
10.20 **Battersea Dogs' Home**
11.00 **Can't Cook, Won't Cook**
11.25 **Can't Cook, Won't Cook**
12.00 **Style Challenge**

## EUROSPORT

**Fríggjadagur 1. september**
7.30 **Cycling**
8.30 **Olympic Games**
9.00 **Athletics**
10.30 **Truck Sports**
11.30 **Motorsports**
12.30 Live - **Motorcycling**
13.00 Live - **Motorcycling**
14.00 Live - **Motorcycling**
15.15 Live - **Motorcycling**
16.20 **News**
16.30 **Cycling**
17.50 **News**
18.00 **Motorcycling**
19.00 Live - **News**
19.30 **Football**
19.50 **News**
20.00 **Football**
22.00 **News**
22.15 **Boxing**
23.15 **Cycling**
0.15 **News**
0.30 **Close**

**Leygardagur 2. september**
7.30 **Xtreme Sports**
9.00 **Beach Volley**
9.30 **Beach Volley**
10.00 Live - **Superbike**
11.00 **Stunts**
12.00 **Motocross**

## 3

**Fríggjadagur 1. september**
5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
8.50 **Knight Rider**
9.45 **Hvide Løgne**
10.15 **Horton-sagaen**
11.10 **Horton-sagaen**
12.05 **Melrose Place**
13.00 **Vild med dig**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Baywatch**
15.45 **Sjov og Spas**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens nyheder på TV3**
17.30 **Ellen**
18.00 **Alle tiders barnepige**
18.30 **Sjov og Spas**
19.00 **Nadine – en skudsikker affære**
20.30 **Tavshed er guld, tale er død**
22.20 **Seinfeld**
22.50 **Sports Night**
23.15 **Simpsons**
23.45 **Vore værste år**
0.15 **Ti tommelfingre**
0.45 **Mike Hammer**
1.40 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.10 **T. J. Hooker**
3.05 **Godnat**

**Leygardagur 2. september**
5.45 **Børne-hjørnet med Disney**
8.45 **X-men**
9.45 **TV-shop**
10.55 **Sjov og Spas**
11.25 **Det lille hus på prærien**

## SVF

**Fríggjadagur 1. september**
19.00 **Upp á lívið - kriminalitetur** - do. kjaksend.fyri ung
19.30 **Eitt djórasjúkrahús í Svøríki** 6:8
20.00 **Dagur og Vika**
20.20 **Mr. Bean**
20.45 **Gekkur**
21.30 **Ein vinur í neyðini** - enskt drama

## VALUTAKURSIR

| | | 31.08.00 | Ultimo juli |
|---|---|---|---|
| *USA* | **Dollarar** | 833,1100 | 806,4000 |
| *Bretland* | **Pund** | 1212,2100 | 1208,6200 |
| *Týskland* | **Markur** | 381,2300 | 381,2200 |
| *Svøríki* | **Króna** | 88,5200 | 87,8000 |
| *Noreg* | **Króna** | 92,3100 | 90,8200 |
| *Frakland* | **Frankur** | 113,6700 | 113,6700 |
| *Belgia* | **Frankur** | 18,4840 | 18,4830 |
| *Sveits* | **Frankur** | 481,3600 | 481,7200 |
| *Holland* | **Gyllin** | 338,3500 | 338,3400 |
| *Italia* | **Liri** | 0,3851 | 0,3851 |
| *Finnland* | **Markur** | 125,4100 | 125,4000 |
| *Ísland* | **Króna** | 10,3100 | 10,2600 |
| *Eysturríki* | **Skillingur** | 54,1870 | 54,1850 |
| *Spania* | **Pesetas** | 4,4810 | 4,4810 |
| *Portugal* | **Escudos** | 3,7190 | 3,7190 |
| *Kanada* | **Dollari** | 565,3000 | 545,0700 |
| *Grikkaland* | **Drakmur** | 2,2080 | 2,2100 |
| *Japan* | **Yen** | 7,8322 | 7,3727 |
| *Írland* | **Pund** | 946,7500 | 946,7200 |
| | **Evra** | 745,6300 | 745,6000 |

FØROYA SPARIKASSI

# Vaksandi leiklutur hjá Útnorðurráðnum í arktiska samstarvinum

Tingmenn úr arktisku londunum USA, Kanada, Grønland, Ísland, Føroyar, Danmark, Noreg, Svøríki, Finnland og Russland hava júst fundast í Rovaniemi í Finnlandi á fjóðru arktisku tingmannaráðstevnuni.

Í røðu síni á ráðstevnuni legði formaðurin í Útnorðurráðnum, Jógvan Durhuus, dent á, at parlamentariska samstarvið er ein týdningarmikil partur av arktiska samstarvinum. Henda vegin ber til at skapa eina neyðuga undirtøku fyri teim uppgávum og verkætlanum, sum Arktiska Ráðið arbeiðir við. Somuleiðis legði Jógvan Durhuus dent á, at Arktiska Ráðið eigur at samstarva við aðrar altjóða felagsskapir í økinum, so sum Norðurlandaráðið og Útnorðurráðið.

Arktiska samstarvið fevnir um nógv týdningarmikil øki. Í røðu síni gjørdi Jógvan Durhuus serliga vart við týdningin av samstarvi um varðveitslu av náttúru okkara í norðaru økjunum. Tað er av serligum týdningi fyri okkum í útnorði, at vit í felag við arktisku londunum virka fyri varðveitslu av havumhvørvi okkara, sum í veruleikanum er heimsins reinasta havøki.

Hann gjørdi eisini vart við týdningin, at framtíðar gagnnýtsla av havsúgdjórum í norði skal fara fram á ein skynsaman hátt. Her segði hann, at vit ikki kunnu góðtaka, at forboð verður sett fyri veiðu av hesum djórum, um vísindaligu serfrøðingar okkara kunnu staðfesta, at hesi als ikki eru í nøkrum vandabólki.

At enda segði Jógvan Durhuus, at Útnorðurráðið er til reiðar til virkna luttøku í arktiska samstarvinum, og soleiðis í felag við aðrar altjóða felagsskapir arbeiða fyri eini betri framtíð í norðaru økjunum.



23.10 **Skapa tær** - danskt undirhald
23.40 **The Painted Lady** 1:2 - ensk krimirøð - Óhósk. fyri børn
1.20 **Liðugt**

## Útvarp Føroya

**Fríggjadagur 1. september**
7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Gunnar Reynslág á Argjum lesur
7.15 **Morguntónleikur**
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Gunnar Reynslág á Argjum lesur
9.15 **Dagsins tónar**
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Máltráðurin** - Telefonirnar 311382 ella 311383 svara kl. 9.30. Elis Poulsen stílar fyri.
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Á sanganna veingjum** (e) - Gunnvør Poulsen stílar fyri
11.30 **Undir døgurða**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Tónleikasending** (e) - Fróði Løkságarð skipar fyri
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Gott gamalt** - Birgar Johannesen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Popp Service** - Nýggjur poppur úr USA og Europa.
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Vikuskiftið**
18.00 **Fríggjakvøldstónar** - Øssur Eghom stílar fyri
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
18.50 **Tónleikur**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen leggur til rættis
19.30 **Poppkvørnin** - Kári Annand Berg stílar fyri
20.00 **Tíðindi**
20.05 **Kvøldarstundin**
21.00 **Skjáttan** - Bjarni Mohr skipar fyri
22.00 **Tíðindi**

**Leygardagur 2. september**
7.15 **Veðurtíðindi**
7.18 **Morgunlestur** - Gunnar Reynslág á Argjum lesur
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Morguntónleikur**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Leygarmorgun í studio 5** - Bjarni Mohr leggur til rættis
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Gunnar Reynslág á Argjum lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Barnaløtan** (e) - Jonna Olsen og Katrin Nolsøe Joensen leggja til rættis
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna og Egga skipa fyri
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Rót og rútma** - Petur Rouch velur country tónleik
12.00 **Veðurtíðindi**

## Rás 2 FM 102 FM 107

**Fríggjadagur 1. september**
8.00 **Góðanmorguntónleikur -** Léttur tónleikur
9.00 **Skipini nær og fjar** - Suni Jacobsen leggur til rættis
9.45 **Orðið** - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi**
11.00 **Ronny ella Ronni -** Ungdómstónleikur
12.00 **Tíðindi & Lýsingar**
12.15 **Léttur tónleikur**
13.00 **Summar á Rás 2 -** Ring inn á tel. 359999, send eina heilsu og ynsk eitt lag!
15.00 **Tíðindi & Lýsingar**
15.15 **Skipini nær og fjar** (e)
16.00 **Breytin beinleiðis -** Ferðslusendingin við Ó.J. Rólantsson og Lailu Jacobsen
17.00 **Mix** - Beinleiðis undirhalds- og tónleikasending v/ Sunnevu Petersen við gestum,
18.00 **Tíðindi & Lýsingar**
18.15 **Léttur tónleikur**
20.00 **Beatin -** Tað nýggjasta nýggja innan fleiri tónleikasløg, m.a. ymiskt, sum ikki er útkomið enn. **-** Eyðfinn Drewsen leggur til rættis
21.00 **Tíðindi & Lýsingar**
21.15 **Orðið** (e) Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 **Léttur tónleikur**
22.15 **Tit & Vit** - Beinleiðis undirhaldssending: Jan í Nesinum & Dagbjartur Meyer Berg skipa fyri **-** Ring inn á 359999 og melda teg til spurningakappingina

**Leygardagur 2. september**
9.45 **Orðið -** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Tónleikur**
12.00 **Channel 2** - Ensk sending fyri ferðafólk og onnur. Michael Hughs & Martin Kjærbo leggja til rættis.

## Lindin FM 101,0

**Fríggjadagur 1. september**
13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.00 **Brot og bitar** (e)
14.30 **Barnalindin**
15.00 **The finishing touch** - Ensk sending við Alex Ocampo -
17.00 **Bønartænastan byrjar** á tlf. 321377 og tilber at senda fax á nr. 321379
**Lovsangur**
17.55 **Dagsins orð** eftir Svenning av Lofti
18.00 **Bønartænastan** - Biðið verður fyri bønarevnunum
19.00 **Prát og tónleikur**
20.00 **Barnalindin** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð** (e)
**Lovsongsløta**
21.55 **Dagsins Orð** eftir Svenning av Lofti (e)
22.00 **Horizon Star** - Ensk sending við Stellu Zachariassen (e)
23.00 **Ungdómssendingin X-Plane**
2.00 **Vit gevast**

## HAVNAR BIO

### Vegurin til Eldorado

Tveir gavtjóðar. Ein sagnarkendur skattur. Ein prestur. Ein vøkur og útspekulerað genta. - og ein trúfastur hestur!

Hetta eru týdningarmestur ingrediensirnir í tí nýggja teknifilminum »Vegurin til Eldorade«, ið sýnir okkum tveir ikki alt ov talentfullar snýtarar, Tulio og Miguel, fáa fatur á kortinum, ið vísir vegin til Eldorado, gylta býin. Vinirnir snýkja seg úr Spania, har nógv eru, sum av ymsum ivasomum orsøkum kundu hugsað sær at fingið fatur á teimum - fyri at gera upp roknskapin. Teir fara til nýggja heimin - á skattajakt, og so byrjar ævintýrið...





### 28 dagar

Blaðkvinnan, Gwen Cummings (Sandra Bullock) ger um seg í náttarinnar villa lívi New York saman við eins villa vinmanni hennara, Jasper (Dominic West). Lívið er ein langur koktailur av sprutti, pillarum, náttarligum útskeiilsum og timburmonnum, til tann dagin, Gwen oyðileggur brúdleypið hjá systur síni, Lily (Elizabeth Perkins), stjelur brúðarlimosinuna, rennur á, ávirkað av rúsdrekka og verður dømd í 28 daga avvenjing.

Tað verður har fyri Gwen at verða hjá Anonymo Alkoholikarunum, AA. Har kann hon m. a. ikki nýta fartelefonina...

### Hanging Up

Tríggjar systrar gera tað, tær duga best - tær tackla lívið, kærleikan og ørskapin við telefonini, ið sambindur tær - tá pápin verður innlagdur. Eftir at hava livað heldur svingandi í fleiri ár og við svingandi kærleika og konstantum telefonuppringingum, hóttir hann nú við at doyggja.

»Hanging up« granska familjuna upp á gott og ilt og upp á tað skemtiligasta. Filmleikstjórin, Diane Keaton, vísir okkum familjuna Mozell: Patriakin Lou (Walter Matthau), elstu dótturina, Georgia (Diane Keaton), sum strembar eftir einum plássi í valdselituni sum blaðstjóri á egna blað sínum, sum eisini er kallað upp eftir henni sjálvari, miðlingadótturin Eva (Meg Ryan), babbasa genta, sum hevur pátikið sær ábyrgdina fyri honum, og yngsta dótturin, Maddy (Lisa Kudrow).




**Frumsýning**
**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 01.09. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 01.09. kl. $19^{00}$
Leygardagin 02.09. kl. $17^{00}$ Leygardagin 02.09. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 03.09. kl. $16^{00}$ Sunnudagin 03.09. kl. $18^{00}$

★ BIO KIOSKIN ★
Heitt Pop–Corn – Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís o.m.a

**HAVNAR BIO**
**✶ Tlf. 311956 ✶**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 01.09. kl. $23^{15}$ Leygardagin 02.09. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 03.09. kl. $22^{15}$

Sí eisini SvF tekstvarp s. 611–613




Fríggjadagin 01.09. kl. $21^{00}$ Leygardagin 02.09. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 03.09. kl. $20^{00}$




Fríggjadagin 01.09. kl. $18^{30}$ Fríggjadagin 01.09. kl. $22^{45}$
Leygardagin 02.09. kl. $18^{30}$ Leygardagin 02.09. kl. $22^{45}$
Sunnudagin 03.09. kl. $17^{30}$ Sunnudagin 03.09. kl. $21^{45}$




Fríggjadagin 01.09. kl. $20^{30}$ Leygardagin 02.09. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 03.09. kl. $19^{30}$